Eldraíbúðir undir Kráarbrekku:

# Um at vera lidnar

*Tær fyrstu 24 íbúðirnar undir Kráarbrekku eru nú um at verða lidnar. Og tey fyrstu búfólkini fara væntandi at flyta inn í komandi viku*



**Nú eru tær fyrstu 24 eldraíbúðirnar undir Kráarbrekku um at vera lidnar, og í komandi viku flyta tey fyrstu væntandi inn**

ELDRAÍBÚÐIR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Arbeiðið upp á verkætlanina undir Kráarbrekku er um at vera liðugt. Beint nú fáast menn við at gera asfaltarbeiðið liðugt og at leggja ta seinastu hondina á arbeiðið inni. Fleiri av íbúðunum eru lidnar, og vaskifólk er farið inn at gera alt tilreiðar til íbúgvarnir flyta inn. Tað er synd at siga, at íbúðirnar eru stórar, men kortini so dugir ein at ímynda sær, hvussu heimligt tað kann fara at verða, tá møblar, gardinur og annað er komið inn. Og ikki at gloyma fólkini. Íbúðirnar liggja soleiðis fyri, at tað er stutt ímillum bygningarnar, og ein dugir at ímynda sær, at tey, sum har búgva, fara at savnast uttan fyri til hugnaligt prát ein góðveðursdag. Har er slætt og gott at ganga. Asfalterað heilt til inngondina, og um onkur hevur tørv á rullustóli, so er tað heldur ongin trupulleiki at fáa hendan trillaðan inn í eina íbúð.

Hóast tað enn í dag sær meira út sum ein spøkilsisbýlingur, tí onki lív er inni, so kann ein og hvør, sum hyggur framvið ímynda sær, at hetta verður ein sera hugnaligur býlingur, tá allar 24 íbúðirnar hava fingið búfólk. Tað er ljóst inni í íbúðunum. Eitt stórt rúm, har køkur og stova eru í einum, eitt kamar og eitt baðirúm. Ein kemur inn í eina lítla gongd og síðani inn í køkin og stovuna.Tað er í teimum smærru íbúðunum. Tær størru íbúðirnar eru eitt sindur øðrvísi innrættaðar. Har er ein gongd og tvey sovikømur og eitt baðirúm. So er køkur og stova í einum, men rúmið sjálvt er størri enn tað í teimum smærru íbúðunum. Íbúðirnar liggja í einum friðarligum og hugnaligum umhvørvi.

Tað er ongin ivi um, at tílíkar íbúðir fara at gera tað lættari hjá fólki, sum eru komin upp í árini. Tað viðlíkahald, sum hoyrir til eitt húsarhald, kemur ein húsavørður, sum verður settur til býlingin, at taka sær av.

## Nú sást endin

Steinbjørn Jacobsen er ein sera fegin maður í dag, tí at nú sást ein endi á fyrsta byggistiginum á hesi verkætlan. Annað byggistig umfatar 24 íbúðir afturat, men borgarstjórin sigur, at hann heldur tað vera skilabetur at lata hetta standa sína roynd, áðrenn farið verður undir annað byggistig.

– Nú mugu vit fyrst steðga á eina tíð og síggja, hvussu hetta fer at virka, sigur hann.

Upprunaliga var ovurstórur áhugi fyri íbúðunum. Men í dag vísir tað so seg, at tað bert eru fólk til 15 av teimum, sum eru oman fyri seksti ára aldur.

Og tað er ikki nóg mikið. Sambært borgarstjóranum í Klaksvík hevur sjálvsognarstovnurin ikki ráð at lata nakra standa tóma.

Viðtøkurnar til verkætlanina siga, at íbúðirnar skulu vera til fólk yvir seksti ár, men at undantøk kunnu gerast. Og hetta sigur Steinbjørn Jacobsen, at tey fara at nýta. Hann sigur, at tað helst verða gjørd undantøk, soleiðis at fólk, sum eru undir 60 somuleiðis fara at kunnu leiga onkra av íbúðunum.

– Hervið meini eg ikki, at tað skulu vera blaðung fólk, men kanska heldur fólk í fimti árunum, sigur Steinbjørn, sum heldur ikki dugir at síggja nakra orsøk til at lata spildurnýggjar íbúðir standa tómar.

Ført hevur verið fram millum fólk, at tann dalandi áhugin kemur av tí høga prísinum fyri at leiga eina tílíka íbúð.

Kostnaðurin liggur frá 3.800 til 4.800 krónum alt eftir um tað eru tær størru ella tær minnu íbúðirnar, sum ein leigar.

Steinbjørn Jacobsen viðgongur, at tað er ein høgur prísur, men hann sigur, at tá tey fingu svar frá umsøkjarunum, var tað slettis ikki ov høgur prísur, sum lat til at vera høvuðsorsøkin til, at tey settust aftur.

– Tað tyktist sum um, at tey nú sóu, at tað er nú, tey skulu flyta, og so hava tey hug at halda aftur og hava spurt, um tey ikki kunnu bíða hálvt ella eitt ár, greiðir Steinbjørn frá.

Høvuðstankin aftan fyri hesa íbúðarætlanina var, at leysgera nøkur hús í Klaksvík, men hóast tað, so streyma umsóknir um grundstykki í Klaksvík framvegis inn til kommununa. Og eisini á hesum økinum hendir nakað. Kommunan fer um stutta tíð í holt við eina útstykking afturat undir Grashjalla, har eini 15 grundstykkir fara at verða afturat.

Sostatt staðfestir borgarstjórin, at nógv hendir í Klaksvík fyri tíðina. Serliga á bústaðarøkinum, men hann vísir somuleiðis á, at ein læknamiðstøð er í gerð, ein rundkoyring í miðbýnum, framhaldandi arbeiðið í ídnaðarhavnini í Ánunum byrjar um heilt stutta tíð og fyrireikingararbeiðið til Norðoyatunnilin er somuleiðis byrjað.

# Stórur áhugi fyri túri til Anfield Road

**Áhugin fyri túrinum til Onglands at hyggja eftir Liverpool og Manchester United á Anfield Road, sum IRIS í Klaksvík skipar fyri, er ovurhondsstórur. Ferðaseðlarnir verða nærum skræddir burtur**

FÓTBÓLTSFERÐ
*Solby A. Eliasen*

Sum áhugin nú hevur víst seg at vera, eru nærum tvey flogfør full av glaðum fjepparum til at fara til Liverpool at hyggja eftir fótbóltsdystinum millum arvafíggindarnar Liverpool og Manchester United.

Í tíðindaskrivi frá felagsskapinum, IRIS, sum skipar fyri túrinum, verður sagt, at sum áhugin er nú, fara tvey flogfør avstað. Upprunaliga var tað bert tað eina, men tað standa eini 60 á bíðilista, so tað er nógv, sum týðir uppá, at tað seinna flogfarið eisini fer at verða fult. Tað sleppa 90 við hvørjum flogfari.

Upprunaliga ferðaætlanin var, at ferðaliðið skuldi fara úr Føroyum um morgunin og so verða aftur í Føroyum á midnátt sama kvøld, men tað er nú broytt soleiðis, at farið verður dagin fyri, also leygardagin 8. novembur klokkan 17 til Manchester, har gist verður á hotelli. Síðani verður farið við bussi til Liverpool morgunin eftir. Hetta hevur so samstundis eina lítla øking á prísinum við sær. Fólk skulu gjalda 400 krónur eyka fyri gisting og buss til Liverpool. So kostnaðurin av túrinum verður 7.900 krónur.

Frá IRIS verður sagt, at alt verður gjørt fyri at gera túrin so hugnaligan og festligan sum gjørligt. Enn eru nøkur atgongumerki eftir til seinna flogfarið, men um ferðin er tann sama, sum hon hevur verið, so verður skjótt útselt. Tann, sum hevur áhuga at koma við, kann venda sær til IRIS í Klaksvík á tlf 456390, 216390 ella 756390.



# Elduvík er ein útdoyggjandi bygd

*Tá man býr í Elduvík er tað mangt og hvat ein kann fáast við. Henda dagin vóru Maibritt og Meinhard í rættini beint uttanfyri bygdina*





*Aron, sum erhálvt annað ár, er eitt ordiligur sprellibassi. Smílandi og blíður við fremmandar gestir*

**Frida Reyná, sum býr í Elduvík, er sannførd um, at um fleiri fólk ikki skjótt flyta til, so doyr bygdin skjótt út. Hon, maðurin og børnini mynda einastu barnafamiljuna í bygdini, men sigur Frida, at tey verða verandi so leingi sum maðurin er kongsbóndi**

SAMRØÐA
*Ingrid/Solby*

**Elduvík:**
Angin av nýbakaðum køkum stendur langt oman í gongina, tá vit koma innar. Niðankomnar gjøgnum trappurnar heilar lítli Aron, sum er hálvt annað ár, beinanvegin uppá okkum. Hann er eitt sindur smæðin í fyrstani, men smædni hvørvur skjótt og verður til blíðskap, og áðrenn long tíð er farin, er hann størsta sjarmutrøllið í bygdini.

– Vit hava føðingardag her í morgin. Meinhard fyllir átta ár, og tí er tað so rokaligt, sigur Frida Reyná, sum hevur búð í Elduvík síðani 1996.

Frida og maðurin, Poul Jóhannus, mynda saman við børnunum einastu barnafamiljuna í bygdini. Ongin handil er, og heldur ongin skúli, men hetta merkir ikki, at Frida situr tómhent um dagarnar, meðan Poul Jóhannus er til arbeiðis hjá KJ-Hydraulik á Kambsdali.

– Eg havi trý børn, so eg havi altíð nóg mikið at gera, sigur Frida, meðan hon tekur tann seinasta bakkan av sandkøkubollum úr ovninum.

## Doyr út

Elduvík er ein lítil bygd. Matstovan, Lonin, er fyri stuttum latin aftur, og nú er so at siga onki, sum dregur fólk til bygdina uttan náttúran.

– Um ongin ger nakað við tað, so doyr bygdin skjótt út. Tú kanst ikki lokka fólk til Elduvíkar at búgva. Um ein skal búgva her, so skal tú hava eina grund. Mín grund var, at eg giftist við Poul Jóhannus, og hann hevur altíð búð her. Hann er kongsbóndi, so tað hevði antin verið her ella í Funningsfirði, sigur Frida, meðan tann lítli spælir á gólvinum. Hon leggur afturat, at tað er tó ikki verri enn so, tí tað tekur bara 10 minuttir, so ert tú úti á høvuðsvegnum.

Frida og Poul Jóhannus hava trý børn. Meinhard og Maibritt, sum eru úti og spæla henda dagin Sosialurin er á vitjan. Tey eru átta og seks ára gomul. Og so lítla Aron.

Frida er sjálv fødd og uppvaksin í Klaksvík, og áðrenn Poul Jóhannus og hon fluttu til Elduvíkar, búðu tey seks ár í Runavík.

– Børnini spæla so nógv úti her. Tær nýtist ikki at hyggja eftir teimum allatíðina. Tað er tað besta her. Her er ongin vandi fyri ferðslu ella at tey detta nakrastaðni. Her er ein á, sum tey spæla í, so tey koma ofta heim við karmi, fortelur Frida, sum vísir á, at tá ferðsluvandin er so lítil, so er tað næstan so, at ein gloymir at læra børnini um ferðsluviðurskiftini.

– Men vit plaga at vera í Runavík viðhvørt, og tá ganga vit ofta eitt fitt stykki, og so royna vit at læra tey um ferðsluna.

Frida merkir stóran mun nú Lonin er afturlatin. Ongir bussar við ferðafólkum koma henda vegin, og nú er mestsum fullkomin friður í bygdini.

– Fyrstu dagarnar var tað virkuliga keðiligt. Tað var bara ein sjálvfylgja, at Lonin var har. Tað var ein hugni og stuttleiki at síggja tá bussarnir komu, og børnini sum spældu uttanfyri, meðan foreldrini sótu inni og ótu. Men so varð tað bara stongt frá degi til dags. Og tað er uttan iva eitt stórt afturstig fyri bygdina.

## Lærir at liva

Sjálvt um Frida og Poul Jóhannus teljast millum tey yngstu fólkini í bygdini, so er hon ikki bangin fyri, at tey enda einsamøll eftir har.

– Eg eri ikki bangin fyri, at vit verða einsamøll eftir her. Tú kanst ikki liva uppá, hvat fer at henda í framtíðini. Ongin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldi skal gista, og soleiðis er tað her.

– Tú lærir at liva, tá tú býrt soleiðis. Tú gloymir ikki tey veruligu virðini - náttúruna. Aðrastaðni sært tú inn í eini hús og oman á ein veg, og har er res allan dagin. Her hevur tú náttúruna beint uttanfyri.

Tá keypt verður inn til reyðu húsini hinumegin brúnna í Elduvík verður keypt stórt inn. Rættiliga stórt. Frida fortelur, at hon dagin fyri hevði verið og keypt inn, og tá vóru 30 pakkar av geri keyptir, og 20 kilo av mjøl.

– Tað er ymiskt, hvussu ofta eg fari úr bygdini um vikuna. Viðhvørt kann eg ongan veg fara í tvær til tríggjar vikur, tá eg aðrar tíðir eri úr bygdini tvær til tríggjar ferðir um vikuna.

Men familjan Reyná hevur ongar ætlanir um at flyta úr Elduvík.

– So leingi Poul Jóhannus er kongsbóndi verða vit verandi. Og tað vænti eg ikki, at hann fer at gevast við, sigur Frida Reyná at enda.



*Frida væntar, at um nøkur ár, so fer Elduvík at doyggja út. Men hennara familja hevur ongar ætlanir um at flyta úr bygdini*